H71

faldari 3

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

H71 - STÍF

Sunnudagin 10. november kl. 16.00

Hoyvíkshøllin

BONUS
J&K
FØROYATELE
SUÐUROYAR SPARIKASSI
Advokatfelagið
Yviri við Strond
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari
bilrokt.fo
P/F THOMAS DAM
ITRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgota 5 · Tel. 31 14 03
polytan

NÚ ER AT KOYRA Á

Eftir Agga Niclasen

Vissuliga, tað er heilt høpisleyst at spáa um nakað úrslit ídag, sum vit við gleði taka ímóti StÍF. Strandingar eru vanliga garantur fyri elegantan hondbólt, og liggi eg inni við einum latentum alski fyri teimum á handara armi fyri tí staði, sviger býr. (Sviger er so priviligerað, at hon er eina um eina heila gøta. Ja, gøta og gøta.)

Óansæð, tað er so fyrst og fremst harífrá, úr Runavík (ikki Saltangará!), at Strendur kemur mær til hugs. Ikki so nógv tí, at eg síggi bygdina, men tí eg hugsi hondbólt – at onkustaðni „har aftanfyri" býr handa hondbóltsmafiain.

Strandingar hava eitt so mikið gott lið, at teir av serfrøðini hava verið mettir at vera FM-favorittar, saman við KÍF, sum vit vunnu á, og VÍF, sum vit burdu vunnið á. Eg haldi spádómar vera undirhaldandi og leiðbeinandi, og tað er framúr, at fólk traðka fram og siga sína meining, meðan onnur lena seg at eftirráðum. Kudos til tey fyrrnevndu.

Men, fyri øllum mínum ekspert-kærleika haldi eg kortini, at hetta við „hópi" vera undirmett. Jú, teir hava eitt FM-lið, men hóp? Nope. Tað merkir tó, at teir á einhvørjum degi kunnu basa hvønn sum helst, hvat teir vístu ímóti Kyndli á útivølli tann 19. oktober. Sama dag, sum vit vunnu á Team Klaksvík, sum vunnu á Kyndli, ið vunnu á okkum. So har hava tit tað: alt er „up for grabs"!

Strandingar hava alt at spæla fyri. Teir vita, at teir eru rímiliga væl fyri. Helst nakað skuffaðir av hesum fyrsta av fýra FM-umførum. Sum so ikki nakað stórvegis trýst, men tapa teir aftur ídag, og hini úrslitini laga seg skeiva

Mynd: Jan Egil Kristiansen

vegin ... fyri teir, tá gerst tað minni høgligt alt fyri eitt.

Tað er líka Kyndil og Team Klaksvík, ið skora minni, effinett 3 mál færri, so har er kanska ein lítil trupulleiki. Men verjan er stinn. Tað eru bara kollfirðingar og hondbóltsliðið úr Havn, ið ætlar sær at dúva uppá vindorku í framtíðini, sum statistiskt hava betri verju.

Hondbólturin í dag verður tí neyvan so ólíkur við tað at liðini bæði eru kend fyri sítt snotuliga og skjóttgangandi hondbóltsspæl. Og skjúttar hava liðini eisini. Fyri H71 er Bogdan, ella SLAMM-SLAMM-SLAMM.

Fyri StÍF Sveinur, tóað ivi er um hansara skaða, hvusssu nógv hesin darvar hansara spæli; ella hvørjum vága hann dittar sær at spæla. Ikki so, hesin frágera góði leikari spældi við liðnum í tess fyrsta dysti ímóti nettupp H71, og tá bleiv hann so ikki avgerandi. Rúni átti hann. Og so á Skála.

Eg rokni tó við einum biip biip biip biip-innsatsi, sum TB-kempan, Óli Johannesen herfyri tók til. Hasin braneggjaði atburðurin, hasin singlandi futtur og kæti, ið kanska var í toppi við Janusi Sørensen og lítlabeiggjanum sum spælskipandi miðleikara, býr í tykkum. Á denn dynamikkur!

Vit hava líknandi dygdir í dag, tað skal bara justerast eitt vet. Og, fyri Guds skyld, lurtið eftir venjarunum, fylgið leikætlanini, rennið aftur og skorið tá fríir. Tað er so mikið lættari og orkufríari. Góð verja gevur, næstan altíð, fleiri mótálop enn ein skræpu verja.

Men píkasjey sum alt er spennandi í ár. Taka vit vindorkuna, tá vinna teir, á pappírinum, truplar dystir, men tapa ímóti, ja, „lættvektarunum“.

Og, týdningarmeiri, H71. Vit vinna á útivølli ímóti StÍF – tað plaga vit aldri. Vit vinna á Team Klaksvík – vit hava tapt fyrr, shit happens!, men allíkavæl tá í einum FM-vinnandi ári. Vit vinna á KÍF – sum enn akkurát er sterkasta liðið í kappingini við hægsta botnniveau.

Við hesi kappingaratferð er væl lættari at rokna út, hvør Illimaður í grundini er, enn finna útav, hvør sleppur at jolla sær í eini FM-finalu.

Vælkomnir til dyst, strandingar, og góðan dyst øll somul!

Koyrið á H71!!!!!!!

Ítróttarfelagið Hoyvík H71
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

NEVND
Sunneva Jakobsen, formaður
sunneva@liv.fo, 23 11 15

Gunn Ellefsen, næstformaður
ge@lawfirm.fo, 59 30 40

Agga Niclasen, nevndarlimur
h71faldarin@gmail.com, 50 86 89

Anna Dam, nevndarlimur
ad@lawfirm.fo, 51 90 82

Hallur Danielsen, kassameistari
hallurdanielsen18@gmail.com, 23 96 15

René Dahl Olesen, skrivari
renedo@faroeship.fo, 54 90 10

SAMSKIPARI
Hallur Danielsen
hdanielsen@sbwcargo.com

HEIMASÍÐUUMSITARI
Carl Herup Høgnesen
carlherup@gmail.com

Anfinnur Hovgaard
anfinnur@gmail.com

Agga Niclasen
H71faldarin@gmail.com

FALDARAUMSITARI
Agga Niclasen
h71faldarin@gmail.com, 50 86 89

SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

MYNDIR
Jan Egil Kristiansen
26 22 40

ÚTGEVARI
H71

EITT MIÐLAKURIOUSUM OG RÓS

TAÐ SKAL HANN EIGA, TRÓNDUR ARGE. EITT ARBEIÐSGREV OG SANNUR ÍTRÓTTARMAÐUR.

Eftir: Agga Niclasen

Og tað er vitnisvert, at hesin maður, hesin óblandaði ítróttarmaður, hevur búð í Englandi og tikið av enska gerandisdegnum. Hann er vanur at arbeiða. Hann veit, at tað er í vikuskiftinum, at ítróttur er, ikki í eini avsíðis sektión av eini redaktión frá mánadegi til fríggjadag ein tíma eftir døgurða.

Og tí kom tað heldur ikki óvart á hondbólts-Føroyar síðsta sunnudag, at júst Tróndur sat so íðin og skyldurøkin í Hoyvíkshøllini. Óført!

Einaferð Føroya mest vitjaða heimasíða skrivar antin bara ella nógv um handa ítróttin, ið nú er í vetrarferiu. Hondbóltur, ella annar ítróttur fyri tað? Tjæ ... jú, teir skriva, onkuntíð, sera sjáldan, men tá er tað sum regul grundað á tað, sum er rapporterað aðrasteðs, fari eg ikki heilt skeivur.

Sum einasti ítróttarreportari, og einasti veruligi rapportari, tá annars útvarpsparturin hjá KvF fær tummilin úr armholuni, er hr. Arge einsamallur maður í feltinum. Tað er væl møguligt, solongi sum Dimma eksisteraði, at teir „skrivaðu um“ annað enn fótbólt, men aðramáta var hatta fyribrigdið „ítróttarhøll“ eins fremmant fyri blaðnum og rakstarvinningur var.

Nú situr Tróndur við opnari teldu og sigur frá í minuttbilum um bæði støðu og hendingagongd. Í fjør var hann í Rás 2 og segði frá dystum saman við viðmerkjara hóast hann ikki, tá!, skilti mun á fet og dribbl, og slettis ikki hasum gula kortinum, sum enn er eitt mysterium fyri meg – helst tí tað er ov samansett og trivielt at hugsa um.

Hvat øðrum enn skrivandi miðlum viðvíkur, skal Leivur Frederiksen og redaktiónin í 3-2 eiga rós. Um nakar hava teir verið við til at styrkt profileringina og popularitetin av hondbólti í Føroyum. Teir kundu kanska offrað eitt sindur fleiri upptøkutólk ella heimildarfólk til fleiri enn tann eina dystin vikuliga, men innsatsurin er góðkendur.

Serliga tá ið so tú sært Leiv og hansara yvirtroytta kameramann, ógreiddir og við skjúrtuni í ólag, báðir tveir, stuna inn í høllina í Vestmanna til hatta frálíka tiltakið, ið eitur Night Cup. Hetta var í fjør, klokkan trý korter til lort um morgunin við sirka 34 áskoðarum. Eisini her óført!

So, takk fyri, tit, ið tíma hondbólt.

Mynd: Jan Egil Kristiansen

HH = HOYVÍKSHØLLIN SvL = Skúlin við Løgmannabreyt

Kl.	Mánadag		Týsdag	Mikudag	Hósdag	Fríggjadag	
	HH	SvL	HH	HH	HH	HH	SvL
14.00						G12	
14.00						G12	
15.00	D12		D10	G12	D10	G14	
15.30	D12		D10	G12	D10	G14	
16.00	G12		G14	U8	G14	D16	
16.30	G12		G14	U8	G14	D16	
17.00	G10		G10		D12	D14	
17.30	G10	U6	G10		D12	D14	U8
18.00	AA	U6	AA		AA	D10	U8
18.30	AA		AA		AA	D10	G10
19.00	D16		AA		AA	D18	G10
19.30	D16		D12		D16	D18	
20.00	D14		D12	D14	D16	D18	
20.30	D14		G17	D14	G17		
21.00	D18		G17	D18	G17		
21.30	D18		G17	D18	G17		
22.00							
22.30							

Deildir	Viðmerkingar
AA	
D18	
D16	
D14	
D12	
D10	
G17	

Deildir	Viðmerkingar
G14	
G12	
G10	Venja eisini í fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt (SvL) fríggjadag kl. 18.30-19.30
U8	Venja eisini í fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt (SvL) fríggjadag kl. 17.30-18.30
U6	Venja í fimleikahøllini í Skúlanum við Løgmannabreyt (SvL) mánadag kl. 17.30-18.30

VENJARAYVIRLIT H71 KAPPINGARÁRIÐ 2013/2014

Deild	Heiti	Navn	Tlf	Teldupost
AA/1. deild	Høvuðsvenjari	Petur Mittún	218284	peturmittun@gmail.com
AA/1. deild	Hjálparvenjari	Halgir Dahl Olesen	549020	halgir@faroeship.fo
AA/1. deild	Kroppsligur venjari	Snorri Paturssón	222814	snorripatursson@hotmail.com
AA/1. deild	Liðleiðari	Lars Tornefeldt	266287	lars_tornefeldt@hotmail.com
AA/1. deild	Hjálpari	Rene Dahl Olesen	549010	renedo@faroeship.fo
D18	Høvuðsvenjari	Gunnar Djurhuus	507008	gunnardjurhuus@gmail.com
D18	Hjálparvenjari	Hallur Biskupstø	517606	hillar_1993@hotmail.com
D18	Hjálparvenjari	Janus Sørensen	264580	janussorensen88@mail.com
D16	Høvuðsvenjari	Birgir Poulsen	593011	bpo@eik.fo
D16	Hjálparvenjari	Rúni Højgaard	261415	runi_hoyvik@hotmail.com
D16	Hjálparvenjari	Bogdan Florea	581569	simoni_k_96@yahoo.com
D14	Høvuðsvenjari	Halgir Dahl Olesen	549010	halgir@faroeship.fo
D14	Hjálparvenjari	Bogi Davidsen	276704	bd0206u7@skulin.fo
D14	Hjálparvenjari	Jónas Djurhuus	506996	jonash71@gmail.com
D12	Høvuðsvenjari	Petur Mittún	218284	peturmittun@gmail.com
D12	Hjálparvenjari	Karl Oddmar Rasmussen	508338	karlor@live.dk
D12	Hjálparvenjari	Rói Joensen	555172	roi.joensen@gmail.com
D12	Hjálparvenjari	Gilli Wardum	220505	gilli.wardum@gmail.com
D10	Høvuðsvenjari	Jens á Skipagøtu	280325	jens.a.skipagotu@skulin.fo
D10	Hjálparvenjari	Rúni Højgaard	261415	runi_hoyvik@hotmail.com
D10	Hjálparvenjari	Hanus Norðberg	519856	hanusn@yahoo.com
D10	Hjálparvenjari	Bogdan Florea	581569	simoni_k_96@yahoo.com
G17	Høvuðsvenjari	Petur Martin Johansen	296260	fc.torshavn@mekonomen.fo
G14	Høvuðsvenjari			
G14	Hjálpari	Hallur Danielsen	504144	hallurd@olivant.fo
G14	Hjálpari	Rene Dahl Olesen	549010	renedo@faroeship.fo
G12	Høvuðsvenjari			
G12	Hjálparvenjari	Eindri Frýdal	274804	eindri94@hotmail.com
G12	Hjálpari	Jákup Símun Simonsen	214154	as@spekt.fo
G12	Hjálpari	Annfinn Simonsen	233474	as@spekt.fo
G10	Høvuðsvenjari	Hendrik Egholm	237410	hendrik@magn.fo
G10	Hjálparvenjari	Tróndur Joensen	272628	thoensen@hotmail.com
G10	Hjálparvenjari	Jákup Sverri Kass	212500	js_kass@hotmail.com
D8	Høvuðsvenjari	Djóni Højgaard	592173	djonsawow@hotmail.com
D8	Hjálparvenjari	Oddur Bech	255625	
G8	Høvuðsvenjari	Hallur Danielsen	504144	hallurd@olivant.fo
G8	Hjálpari	Sámal Paulason	223453	tsh@kallnet.fo
G8	Hjálpari	Silja Sámalsdóttir	521968	
G8	Hjálpari	Maria H. Weyhe	271036	
U6	Høvuðsvenjari	Beinta Ejdesgaard	226620	beinaej@hotmail.com
Ungdóms	Málmansvenjari	Ari Egason Dam	512090	aed@eik.fo
Ungdóms	Hjálpari	Hanus Kristiansen	239617	hakr@sbw.fo
Ungdóms	Hjálpari	Tóraldur Kollsker		

LEIKUM FAGURT

TIL LEIÐARAR, VENJARAR, DÓMARAR, FORELDUR, LEIKARAR OG ÁSKOÐARAR

LEIKUM FAGURT

- HAV JALIGAN ATBURÐ
- ROYN ALTÍÐ TÍTT BESTA
- VÍS VIRÐING FYRI ØÐRUM
- UMBOÐA FELAGIÐ SØMULIGA
- FAR VIÐ ØÐRUM, SUM TÚ YNSKIR, AT ONNUR FARA VIÐ TÆR

LEIKUM FAGURT

EIN HEILSAN OG ÁHEITAN FRÁ

H71

TIL ALLAR H71'ARAR OG ONNUR, IÐ KOMA Í HOYVÍKSHØLLINA

HVØR SPÆLIR NÆR OG HVAR

TAÐ ER Á ÚRSLITATÆNASTUNI HJÁ HSF, AT VIT SÍGGJA OG KUNNU FYLGJA VIÐ GONGDINI Í FØROYSKUM HONDBÓLTI. LEINKJA TIL HESA TÆNASTU ER AT FINNA Á HEIMASÍÐU FELAGSINS OVALAGA OG NAKAÐ HØGRAVENT Á SOMU FORSÍÐU.

Eftir: Agga Niclasen

Hetta er síða, skilji eg á lagnum, Petur Even plagar at seta seg frammanfyri við kaffimunni, tá ið hann keðir seg. Typiskt eitt fríggjakvøld. Og eg skilji hann væl, og hann er væl treyðugt eina um hetta tíðsfordrív, tí oftani er Úrslitatænastan hugaligur lesnaður ... fyri H71.

Vit eru væl við, tað veri seg í A- og B-bólkum. Um ikki nummar 1, tá nummar 2, ella 3. Og tá ofta við einum riðili av liðum í sama bólki.

Við hesum ber til at gera upp støðuna og okkurt slag av rivaliserandi uppgerð millum feløgini. Kann tykjast heldur infantilt, men hey!, kapping hevur aldri kravt so øgilia nógv offur.

Mest politiskt rætta nýtslan av tænastuni er tó at kunna seg um, nær „mítt“ lið skal spæla næstu ferð; ímóti hvørjum og hvar. Við hesum ber til at leggja ætlanir fyri vikuskiftið, serliga um tú umsitur og hevur evstu ábyrgd av fleiri børnum.

Tað er ikki bara at siga tað, at fáa alt at hanga saman, um tú nú eisini ætlar at fylgja øllum dystunum, allir tínir gullmolar spæla.

Vit royna sum frægast at síggja ALT. Ella, tað siga vit so við børnini. Skil meg rætt, tað er stuttligt at vera saman við teimum. Upp tíðliga ein leygardag, niðan í Magn at keypa sær ein stóran Amerikano, okkurt fólkaheilsuráðisligt til fólkið aftanfyri í bilinum, finna hasa Winehouse-fløguna fram og trýsta PLAY so skjótt sum Altso byrjar.

(Heldur hoyra eina ovurfínkaða og lekra rokkstjørnu av einum alkoholikara enn ein føroyskan miðalklassa skræða seg íhel um innantóm gerandisproblem. Problem, sum fyri ikki so langtsíðani ikki vóru problem ... inntil latté-drekkandi snakkiklassin tók yvir og terapeutaði alt samfelagið til potensiell offur, har alt persónligt skal diskuterast, og tín lutur

altíð kann forbetrast. Ókey, Amy forkom sær av ólógligum marglætisvørum, men hon livdi eitt flott og produktivt forbrúkslív við einum ørgrynnu av poppperlum.)

Onkuntíð, tó, haldi eg, at vit foreldur ella tey, ið varða at, eiga at lata børnini fara avstað og sosialisera seg í frið. Hitt, foreldranna skumppolitikkur, er ikki bara gott. Lat børnini endiliga klára seg sjálvi handa tíman ella fimm, tað snýr seg um, tí títtum er væl lættari hjá barni at koma saman við liðfeløgum og bygdabørnum uttan okkara uppíbland. Gev teimum tí hasa 20-krónuna við niðan í Hoyvíkshøllina á dystarmorgni, og bið tey finna sær ein bil. Og so kanst tú fara út í urtagarðin, fiksa okkurt úti í garasjuni ella, sum eg, leggja teg aftur og droyma um menniskjasligar akkumulatorar.

Á hin bógvin er tað nú nokkso feitt, kvalitetstíð, haldi eg tað eitur, at fylla bilin við ovmikið av brennievni og koyra avstað við børnunum. Eg elski at koyra til Vestmanna. So frískligt. So lítandi. Og so býr Finnur Koba har.

Eventuelt kanst tú kvissa avkomið í føroyskari landalæru. Nógvir skúlar eru ikki reiðiliga greiðir yvir, enn!, at nakað eitur Heimstaðarlæra og Landalæra, men brúka ístaðin tíðina uppá at tráðspyrja ungfólkið um „hvussu nógv komu í skúla í bili; hvussu nógv rennandi, ella bara gangandi ... og grulvandi".

So slíkur túrur er eginliga eitt gylt høvi at læra børnunum nakað, nógvir skúlar hava gloymt sum føroysk landalæra og landalæra yvirhøvur er farin í ommuna takkað veri „Náttúri og tøkni", hvørs pensum-bók byrjar við jarðskjálvta, og endar við brekaðum aftaná at hava takklað ónda CO2-útlátið. Fantastiskt.

Eisini er tað ein góður møguleiki hjá vaksnum at koma saman við øðrum vaksnum, soleiðis face to face, og ikki skerm til skerm. Tað er heilt ótrúligt at uppliva fólk tosa ríviliga høviskt og vælmeinandi við hvønnannan í tí, vitonnur skíra „normalar umstøður", hvat fb og aðrir asosialir miðlar ikki eru. (Forrestin er tað ein misskiljing, tá ið fólk halda seg inna politiska aktivismu við at „dáma" á feysbukk.)

Burturúr hesum sosialiteti spyrst nógv burturúr, vinalag ella bara dámligt og totalt innihaldsleyst túnaprát. Og venjingarlegur, sum eru minst líka nógv fyri tey vaksnu sum tess, tá alt kom til alt, ynsktu óhapp. Spyr bara foreldrini at árgangi 2000 gentum.

E ❤ Úrslitatænastuna





Myndir: Jan Egil Kristiansen

Myndir: Jan Egil Kristiansen

TEY SVØRTU TØLINI

DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

Dato	Heimalið	Útilið	Úrslit
29.09.2013	StÍF	H71	29-30
09.10.2013	H71	Neistin	25-29
19.10.2013	Team Klaksvík	H71	26-32
23.10.2013	H71	VÍF	26-27
26.10.2013	Kyndil	H71	23-20
03.11.2013	H71	KÍF	28-25
10.11.2013	H71	StÍF	
17.11.2013	Neistin	H71	
01.12.2013	H71	Team Klaksvík	
08.12.2013	VÍF	H71	
15.12.2013	H71	Kyndil	
21.12.2013	KÍF	H71	
04.01.2014	StÍF	H71	
12.01.2014	H71	Neistin	
12.02.2014	VÍF	Neistin	
12.02.2014	Team Klaksvík	H71	
19.02.2014	H71	VÍF	
22.02.2014	Kyndil	H71	
02.03.2014	H71	KÍF	
09.03.2014	Neistin	H71	
12.03.2014	H71	StÍF	
23.03.2014	H71	Team Klaksvík	
02.04.2014	VÍF	H71	
06.04.2014	H71	Kyndil	
12.04.2014	KÍF	H71	

STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

Nr.	Lið	Dystir	V.m	T.m.	Munur	Stig
1	KÍF	6	173	140	33	8
2	VÍF	6	190	160	30	8
3	Neistin	6	157	167	-10	8
4	H71	6	161	159	2	6
5	Kyndil	6	147	149	-2	6
6	StÍF	6	150	159	-9	4
7	T. Klaksvík	6	147	191	-44	2

LIÐINI HESUFERÐ

H71

Málmenn:

1 Ári Egason Dam

12 Tóraldur Kollsker

21 Hanus Kristiansen

Útileikarar:

4 Rúni West Højgaard

14 Sigmundur Dahl

5 Bogi Gaard Davidsen

17 Hallur Biskupstø

13 Bogdan Florea

6 Tróndur Arge

7 Esbern Patursson

10 Birgir Poulsen

15 Sigmundur Nolsø

6 Hanus Norðberg

18 Andor Sivertsen

21 Pætur Thomsen

8 Jónas Gunnarsson Djurhuus

3 Høgni Olafsson

Høvuðsvenjari: **Petur Mittún**

Venjari: **Halgir Dahl Olesen**

Málmansvenjari: **Hákun Djurhuus**

Liðleiðarar: **Andrass Marr Poulsen, Lars Tornefelt og René Dahl Olesen**

StÍF

Málmenn:

1. Levi Nybo
2. Johan R. Nielsen

Útileikarar:

3. Leivur Justinussen
4. Fríði R. Djurhuus
5. Jógvan Berg
6. Sveinur Justinussen
7. Jón Rasmussen
8. Jógvan G. Joensen
9. Marius Joensen
10. Høgni Jensen
11. Janus Bertelsen
12. Jákup Bertelsen

Venjari: **Dejan Lacok**

Liðleiðarar: **Rósing Hansen**